# Útibarnagarðurin Fjallafípan í Klaksvík

Søkt verður eftir tveimum, møguliga trimum hjálparfólkum, størvini eru 30 tímar um vikuna

- 1 barsilsvikari at byrja 1. september
- 1 hjálparfólki frá 1. september til 1. februar 2006

**Í okkara dagliga arbeiði leggja vit m.a. stóran dent á:**

- At skapa álit og tryggleika, bæði fyri foreldur og børn, soleiðis at tey ekkaleys kunnu fara til arbeiðis og vita sær, at børnini eru í góðum hondum
- At vit seta okkum inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- At skapa fjølbroyttar menningarmøguleikar í einum kreativum umhvørvi
- At hava gott foreldra- og starvsfólkasamstarv

Útibarnagarðurin Fjallafípan er ein kommunalur stovnur, sum liggur í einum sera náttúruríkum og avbjóðandi umhvørvi tætt við haga og fjøru.

Lønar- og setunartreytir eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Umsónir við avtiti av prógvi og møguligum viðmælum skulu verða stovninum í hendi í seinasta lagi 15. juli 2005.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:

**Útibarnagarðurin Fjallafípan**
v/Jóhannu Vest
FO-700 Klaksvík
Tlf. 458415

# Málningar til sølu

Hesir málningar eru til sølu:
Sigmund Petersen (1936):
Suðuroyggin, Dímun og Skúvoy í baksýni.

Sigmund Petersen (1936):
Bygdalag við Hoydesum.

Jack Kampmann (1956): Litografi.

Jógvan Waagstein: Bókahandilin og Vaglið.

Myndirnar kunnu síggjast á Advokatskrivstovuni.

Og so skriva sum eitt nýtt síðsta reglubrot: Nærri fæst at vita við at venda sær til Halgir W.Poulsen, adv., ella Birnu Joensen, skrivara

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøtu 9 · Tórshavn**
**Tlf. 311145**

# Kappsigling

*á Sundalagsstevnuni í Hósvík*
*sunnudagin 19. juni kl. 15.00*

Møtt verður í bátahylinum 1 tíma áðrenn.
Tilmelding fer fram hjá
Kristian Hansen 422 425 / 221 351
og hjá Agnar Olsen 422 323 / 212 323

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Bioanalytikari

Rannsóknarstovan á Landssjúkrahúsinum søkir eftir avloysara fyri bioanalytikara í farloyvi.
Starvið er frá 1. septembur 2005 til 31. august 2006.
Starvið er fulltíðarstarv við tilkallivakt heimanífrá.

Rannsóknarstovan húsast í spildurnýggjum hølum og hevur góðar arbeiðsumstøður.
Rannsóknarstovan er eitt integrerað laboratorium, har øll 5 serøkini innan bioanalytikarafakið er umboðað, umframt ambulatorium á LS og á læknamiðstøðini í Runavík.

Í løtuni starvast her um 20 bioanalytikarar, 2 skrivarar og 1 hjálparfólk. Allir bioanalytikarar skifta millum tey ymsu serøkini.

**Arbeiðsuppgávurnar** verða í fyrsta umfari innan kliniska biokemi og ambulatoriivirksemi.

**Førleikakrøv**
- bioanalytikaraútbúgving
- góð samstarvsevni og fleksibilitetur

**Løn- og setanartreytir** sambært sáttmála millum Bioanalytikarafelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreist** 1. august 2005 kl. 12.00
*Tað er umsøkjarans ábygd, at umsóknin er á starvsfólkadeildini, áðrenn freistin er úti.*

**Nærri fæst at vita** við at venda sær til leiðandi bioanalytikara Ivy Hansen tlf 304500 lokal 5602 ella teldupost ivyh@lsh.fo

**Skrivlig umsókn** í brævbjálva merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum og øðrum upplýsingum skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

# NISSAN PATROL
persónbilur til sølu



Nissan Patrol 2.8 Turbo
í sera góðum standi.
Bilurin er frá mai 1995,
hevur koyrt 136.000 km.
Søluprísur er 105.000,-

Tlf. 216364

**Fiskiveiðieftirlitið**

# Dekkarar til Fiskiveiðieftirlitið

Tvey størv sum fulltikin dekkari og eitt starv sum ófulltikin dekkari á skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verða hervið lýst leys.

**Fulltikin dekkari:**
Arbeiðið umfatar at ganga vakt, og annars taka lut í vanligum skipsarbeiði.

**Førleikakrøv:**

- Lýkur krøvini sum fulltikin dekkari sambært kunngerð nr. 50 frá 12. mai 1999 um sjóvinnubrøv og útbúgvingarkrøv til sjófólk.
- Heilsuváttan fyri sjófólk (uttan avmarkingar og skikkaður til kagtænastu)
- Trygdarskeið. Fyrimunur er við gildugum trygdarskeiðsprógvi.
- Prógv, so sum vaktarhald, frc, bátaførara, eldsløkking, fyrstuhjálp, vinnukavari og onnur ið eru viðkomandi fyri starvið. Fyrimunur er við gildugum prógvum.

Størvini sum fulltikin verða at seta sum skjótast.

**Ófulltikin dekkari til Fiskiveiðieftirlitið**
Ert tú ung/ungur, og hevur hug til arbeiði umborð á skipi, er hetta ein góður møguleiki.
Starvstíðin sum ófulltikin dekkari, telur á sama hátt sum starvstíð við handilsskipum

Arbeiðið umfatar at ganga vakt, og annars vanligt deksarbeiði.

**Førleikakrøv:**

- Heilsuváttan fyri sjófólk (uttan avmarkingar og er skikkaður til kagtænastu)
- Trygdarskeið. Fyrimunur er við gildugum trygdarskeiðsprógvi.

**Setanin er avmarkað til tvey ár.**
Starvið sum ófulltikin verður at seta frá 09 sep 2005

Setanartreytir og løn eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið er Fiskimálaráðið og stovnar undir tí. Tænastustaðurin er í løtuni Fiskiveiðieftirlitið.

Skrivlig umsókn við: **CV, avriti av prógvum og møguligum viðmælum**, skulu vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 27. juni 2005 kl. 12.00.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálaráðið**
Att.: Fiskiveiðieftirlitið
Postsmoga 347
110 Tórshavn

*Nærri upplýsingar um starvið, kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 35 30 30 og tosa við Jóannes Heimustovu, samskipara.*

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo